



Royal hárfríðkan · Coca-Cola · Atlantic Airways · Carlsberg · Kallkyn · Events · RÁS 2 ...títt radio

LEYGARKVØLDIÐ
8. mai kl. 19-21



hvonn ★★★★★ LIVE

# Rasmus Seebach

Hann er eftir ongari tíð blivið eitt tað størsta og mest seljandi poppnavnið í Danmark. Hann er sonur kenda tónleikaran Tommy Seebach, men hann dugir sanniliga sjálvur.

**Rasmus Seebach** hevur hittað við sangum sum Engel, Glad Igen og Den Jeg Er, sum er sangur um pápa hansara, sum doyði bert 53 ára gamal.

**Prátað verður við Rasmus Seebach um at finna síni egnu bein at standa á, og Rasmus Seebach spælir live í sendingini.**

## Miðlarnir og nýggir miðlar

Frambrotini innan tøkni eru stór og nógv í hesum døgum. Samfelagið verður mest sum kollvelt við nýggjum hættum at samskifta, undirhalda og upplýsa. Men hvussu skulu fólk og fjølmiðlar taka nýggju tíðina til sín, og hvagar gongur leiðin nú. Vit tosa við Høgna Rasmussen, stjóra á Sansum, og Allan Dalgsgarð, stjóri á Sendistovuni, um hetta.

## Jústines og Sakaris spæla


Jústines

Jústines í Túni og Sakaris Joensen eru millum finalistarnar í singer/songwriter kappingini á Kafe Kaspar leygarkvøldið. Teir hita upp til finaluna við framførslu á Hvonn Live hesaferð. Teir spæla lívligar og fangandi sangir, sum teir sjálvir hava skrivað.


Sakaris



## Todi um gleði og ótta

Tað er ikki nóg mikið at verða góður fótbóltsspælari fyri at náa langt innan ítróttin. Tú skalt eisini hava viljan, dirvið og ambitiónirnar. Todi Jónsson gevur ungum fótbóltsspælarum persónliga frálæru, og prátað verður við hann um hetta arbeiði. Hvat skal til fyri at náa langt innan fótbólt, hvussu ber til at brynja seg mentalt, og hvussu sleppur tú av við óttin fyri at kiksa?